# Fiskivinnan skal í summarfrí

**Fyrrverandi landsstýrismaðurin, Jørgen Niclasen, heldur, at fiskivinnan á landi og sjógvi átti at verið álagt við lóg at fara í sonevnda ídnaðarfrítíð á hásumri. Fólkaflokkurin ynskir eisini at fáa ein sjómannadag í lag**

LØGMANSRØÐU-VIÐGERÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Fyrrapartin var farið undir viðgerðina av røðuni hjá løgmanni á ólavsøku. Andstøðulimirnir, Høgni Hoydal og Jenis av Rana, høvdu ikki óvæntað nógv at finnast at*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Fríggjadagin fer løgtingið undir at viðgera uppskot um at broyta lógina um vinnuligan fiskiskap. Tað er landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, ið legði uppskotið fram á ólavsøku.

Ein av broytingunum í uppskotunum hjá landsstýrismanninum er at innføra sonevnda ídnaðarfrítíð fyri fiskivinnuna á landi og sjógvi. Hesum tók fyrrverandi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, fult undir við undir viðgerðini av løgmansrøðuni mikudagin.

– Sambært lógini um vinnuligan fiskiskap hevur landsstýrismaðurin heimild til at áseta veiðubann eftir botnfiski á føroysku landleiðunum í eitt tíðarskeið á hásumri. Henda heimild kundi hóskandi verið nýtt til at áseta vinnuni at halda summarfrítíð á hásumri, heldur Jørgen Niclasen.

Hann vísir á, at tað vanliga er torført hjá bæði virkjum og skipum at fáa raksturin at hanga saman á hásumri, og tað tískil kundi verið skilagott við lóg at ásett vinnuni at hildið frí seinnu hálvu av juli mánaði.

Jørgen Niclasen mælir til, at tvær vikur verða settar av til sonevnda ídnaðarfrítíð hjá fiskivinnuni á landi og á sjógv á hvørjum ári.

### Sjómannadag

Mammudagur. Kvinnudagur. Arbeiðaradagur.

Hetta eru bert nakrir av døgunum, vit føroyingar hátíðarhalda á hvørjum ári. Nú skjýtir Fólkaflokkurin upp, at ein serligur sjómannadagur verður ásettur á hvørjum ári. Hugskotið til ein føroyskan sjómannadag stavar úr Íslandi.

– Sjálvssagt eigur ein fiskivinnutjóð at hava eina serliga dag, har sjómenn vera heiðraðir. Sjálvssagt hava fiskimenn uppiborið at fokus verður sett á teirra viðurskifti, og tískil fara vit at virka fyri, at ein slíkur dagur fast í lag, heldur Jørgen Niclasen.

Hann skjýtur upp, at landsstýrið saman við manningarfeløgnum kemur ásamt nær sjómannadagurin skal ásetast.

– Í Íslandi er sjómannadagurin altíð hátíðarhildin fyrsta vikuskiftið í juli. Tað kundi verið skilagott hjá okkum at hátíðarhildið sjómannadagin í samband við ídnaðarfritíðina, sum vit skjóta upp verður í seinna parti av juli hvørt ár, sigur Jørgen Niclasen.

# Roknisjusk í løgmansrøðuni

**Landsstýrið hevur gyltar ætlanir um, at 15% av føroysku húsahaldunum skulu hava breiðband við árslok 2006. Hetta er mál er fyri langari tíð rokkið**

LØGMANSRØÐU-VIÐGERÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

»15% av føroysku húsarhaldunum skulu hava breiðband við árslok í 2006«

Hetta er eitt av ítøkiligu málunum, sum løgmaður og ABC-samgongan hevur sett sær fyri komandi ár. Ikki kann sigast, at málið er serliga framsøkið.

Í Føroyum búgva sløk 48.000 fólk, og siga vit at trý fólk ganga upp í hvørt húsarhaldið, so eru um 16.000 húsarhald í Føroyum. 15% av 16.000 húsarhaldum eru góð 2.400 húsarhald. Landsstýrið hevur tískil ætlanir um, at sløk 2.400 húsahald við árslok 2006 skulu hava breiðband.

Tvíheldur landsstýrið um sítt mál við breiðbandinum skal helmingurin av húsarhaldunum í Føroyum, sum longu í dag hevur breiðband, lata breiðbandið frá sær.

Hetta marghháttiliga støða kom fram undir viðgerðini av løgmansrøðuni fyrrapartin mikudagin. Framsøgumaður Miðfloksinis, Jenis av Rana, hevur verið í samband við Fjarskiftiseftirlitið, og sambært hagtølunum hava 4.800 húsarhald í dag breiðband - also dupult so mong, sum landsstýrið ætlar skal við árslok í 2006.

Fjarskiftiseftirlitið sigur, at fleiri og fleiri húsarhald velja at fáa sær breiðband, og við árslok í ár hava væntandi millum 5000-6000 húsarhald breiðband.

# Javnaðarflokkurin fer ikki glaðbeintur at einskilja

**Javnaðarflokkurin ætlar sær at fara varliga fram í einskiljingartilgongdini, hóast Landsstýrið hevur sett eina ítøkiliga tíðarætlan fyri einskiljingum av almennum fyritøkum út í kortið**

LØGMANSRØÐU-VIÐGERÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Undir viðgerðini av løgmansrøðuni, ið fór av bakkastokki fyrrapartin mikudagin, kom undan kavi, at samgonguflokkurin, Javnaðarflokkurin, ætlar sær ikki glaðbeintur at einskilja almennar fyritøkur.

– Tað er neyðugt, at vit meta í einstøkum førum, um tað er ein fyrimunur fyri samfelagið at einskilja. Vit skulu í hvørjum dømi meta um einskiljingin tænir okkum sum samfelag og hugsa okkum væl um, áðrenn einskiljingarnar verða framdar, segði framsøgumaður Javnaðarfloksins, Kristian Magnussen undir viðgerðini av løgmansrøðuni.

Hann vísti á, at tað var neyðugt at taka støðu frá máli til mál.

– Vit skulu seta okkum spurningar í samband við, hvørja møguliga sølu av almennum ognum. Millum hesar spurningar eru um tað er meira gagnligt fyri samfelagið, at fyritøkan fer á privatar hendur heldur enn at verða varðveitt undir tí almenna. Ein annar spurningur, vit verða noydd at seta okkum, er um vit framhaldandi ynskja virksemi varðveitt í Føroyum og um einskiljingin fer at hava størri dynamikk við sær, vísti formaður í tingbólki Javnaðarfloksins á.

### Løgmansrøðan

Í røðuni hjá løgmanni á ólavsøku kom fram, at landsstýrið hevur sett eina ítøkiliga tíðarætlan fyri einskiljingar av almennum fyritøkum komandi árini. Ætlanin fevnir um at einskilja Føroya Banka, Atlantsflog, Føroya Tele, Farmaleiðir og Føroya Lívstrygging.

Somuleiðis er ætlanin at selja útlánsrøðirnar hjá Húsalánsgrunninum í 2006 í samband við at grunnurin verður umskipaður við nýggjum bústaðarpolitiskum endamálið. Framtaksgrunnurin hevur eisini boðað frá, at Fiskavirking verður boðin til sølu í heyst.